## Musikklærarar í Gerðarrættin

Ósemjan millum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið um koyripening til musikklærarar endar nú í Fasta Gerðarrættinum. Partarnir vóru á einum seinasta fundi í mánadagin, men har var eingin loysn funnin. Við Útvarpið segði formaðurin í Musikklærarafelagnum, Sunleif Rasmussen, at tað er láturligt at eitt mál um bara 200.000 krónur skal koma so vítt. Í tvey ár hava musikkskúlalærararnir ikki fingið endurgjald fyri tíðina, tey brúka til ferðing. Tað hevur gjørt, at fleiri lærarar hava søkt starv á teimum stóru plássunum, so tey sleppa undan at ferðast, og tískil eru færri lærarar eftir úti á bygd.



## Vilja loyva polygami

Limir í Radikal Ungdom og Venstres Ungdom í Danmark skjóta upp, at polygami, ella fleirgifta sum tað eisini eitur, verður lógligt. Tey ynskja, at ein giftur maður skal hava møguleika fyri at hava fleiri konur, á sama hátt sum giftar kvinnur eiga at kunna gifta seg við fleiri monnum. Sambært ungdómspolitikkarunum er tað ikki heilt uttan krøv, at fleirgiftan skal loyvast. Tí ein giftur maður skal ikki uttan víðari kunna fáa sær eina konu aftrat. Tað skal konan, hann upprunaliga er giftur við loyva honum, og umvent. Harumframt skulu serlig atlit takast til børn.

# Heims klassikari loksins á føroyskum

**Nýggja forlagið Eksil hevur nú útgivið føroysku týðingina »Umskapanin«, ið er kendasta verkið eftir Franz Kafka**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Agnar Jógvansson stendur fyri føroysku týðingini av »Die Verwandlung« sum hon eitur á týskum, og nú er komin í bókhandlarnar kring alt landið.

Hendan langa stuttsøgan er eitt tað kendasta modernistiska prosaverkið í 20. øld – hon er ein mynd av fremmandagerðingini, sum modernisman hevði við sær, og er eitt av kendastu verkunum innan heimsbókmentir úr 20. øld.

Listamaðurin Jóannes Lamhauge hevur prýtt permuna og sniðgivið bókina, sum er prentað í offsetprenti í Keypmannahavn.

### Leingi ávegis

Bókin hevur verið ávegis leingi, og bæði málkøn í týskum og í føroyskum hava gjøgnumgingið bókina.

– Tað hevur verið sera hart arbeiði við hesari týðingini, harðari og drúgvari enn vanligt, men harafturímóti er manningin eyka vælnøgd við úrslitið. Eg veit ikki, hví hesin klassikarin, sum einki mál kann vera fyriuttan, ikki langt í verðini síðan er útkomin í føroyskari týðing, sigur týðarin Agnar Jógvanson, sum er BA í bókmentum úr Onglandi.

### Vælegnað til skúlabrúks

Forlagið v/ Kim Simonsen metir, at slíkar bøkur sum Umskapanin kunnu hækka støðið á føroyskum bókmentum, og eisini gera tað møguligt at fylgja við í bókmentaligum heimsrákum innan bókmentir á føroyskum máli.

Forlagið upplýsir, at bókin eisini inniheldur ein stuttan inngang; eisini er ein útgangur eftir týðaran. Hetta ger bókina egnaða sum undirvísingartifar til eldru flokkarnar í fólkaskúlanum, næmingar í miðnámsskúlunum og á lærdum skúlum, har bókin kann brúkast í mál og bókmentagreinum.

Agnar Jógvansson er BA í evropeiskum heimspeki og bókmentum úr ARU í Onglandi, og virkin týðari og høvundur. Hansara fiktivu ferðafrásagnir eru vælumtóktar millum føroyingar, av tí at tær eru bersøgnar og ráar - tó dyrkar hann eisini tað surrealistiska stuttsøgutekstaslagið, eins væl og aforismurnar. Umskapanin er hansara onnur útgáva. Agnar arbeiðir við at týða fleiri norðurlendskar skaldsøgur.




*Jóannes Lamhauge hevur gjørt permumyndina, sum Agnar Jógvansson hevur týtt*

## Høgni Reistrup við fløgu

Í dag kemur fyrsta solofløgan hjá Høgna Reistrup út. Á fløguni, ið ber heitið "Hugafar á ferð", eru tíggju sangir, ið Høgni sjálvur hevur smíðað orð og lag til. Tað er plátufelagið Tutl, ið gevur fløguna út. Upptøkurnar eru gjørdar í upptøkuhølinum hjá Terja Rasmussen í Nólsoy, og Finnur Hansen hevur ljóðblandað. Tónleikararnir á fløguni eru í stóran mun teir somu, sum mannaðu vælumtókta prixbólkin Lawetz. Harafturat eru fleiri gestatónleikarar við á fløguni, harímillum ein strúki trio. Vakra fløguúsan hevur evnaríki listamaðurin Heiðrikur á Heygum evnað til.

Útgávukonsertin verður í Meiarínum mikudagin 18. juli.

## Síðstaupptøkan hjá Karl Anton

Á MySpace síðuni hjá Kaj Klein liggur síðsta upptøkan hjá Plastnoist, meðan Karl Anton Klein, sáli, var við. Søguliga upptøkan varð gjørd í Keypmannahavn tann 12. januar 2001. Kaj greiðir frá:

- Upptøkan er tikin við einari lítlari mikrofon og ein minidisk-upptakara á einum staðið, ið kallaðist Kronsj og lá við Øresundsvej á Amager.

- Sjálvt um sangurin er skrivaður heilt afturi í '77, so fekk hann alla tíðina loyvi at útvikla seg. Bróðir, Karl Anton, syngur og spælir gittara, og hetta var eisini síðsta upptøkan hjá Plastnoist, meðan hann var við.

*-háberg*

# Starvsfólkini keypt Team 85

**Poul Clementsen, Høgni H. Jacobsen, Edith Dahl Jensen og Tórður Patursson eiga nú Team 85 alt sum tað er**

HANDIL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í 2005 keyptu tey fýra starvsfólkini í Team 85, Poul Clementsen, Høgni H. Jacobsen, Edith Dahl Jensen og Tórður Patursson, helvtina av fyritøkuni frá Dimmalætting. Mánadagin varð keypið av hinari helvtini endaliga avgreitt, soleiðis at tey nú eiga øll partabrøvini í Team 85. Hetta merkir, at Hjalgrim L. Samuelsen og Lisbeth L. Petersen úr nevndini, og í teirra stað koma Tórður Patursson og Høgni Heinesen Jacobsen.

– Vit høvdu eina optión upp á at keypa restina. Henda var galdandi til 2009, og hana valdu vit so at brúka nú, sigur Poul Clementsen, stjóri í Team 85. Hann leggur dent á, at keypið varð gjørt í sátt og semju við Dimmalætting, og at einki ilt er millum fyritøkurnar báðar.

– Og tað lá eisini í kortunum, at hetta fór at henda, sigur hann.

Handilin kom upp á pláss fyri tíð síðani, men varð ikki endaliga skrásettur fyrr enn fyri tveimum døgum síðani. Sambært stjóranum í Team 85, so vera tað ikki tær stóru broytingarnar í fyritøkuni beinanvegin, hóast tað nú eru fýra starvsfólk og ikki longur Dimmalætting, sum eigur lýsingarfyritøkuna.

14 fólk starvast hjá hjá Team 85.



*Poul Clementsen hevur saman við trimum starvsfeløgum keypt restina av partabrøvunum í Team 85*

savnsmynd